# REGLUGERÐ
fyri IRF

IRF

## INNIHALD

1. Inngangur . . . 3
2. Endamál . . . 3
3. Reglurnar umfata . . . 3
4. Skipan . . . 3
5. Allýsingar . . . 4
6. Húsarhald: Innsavningarskipan til húsarhaldsburturkast . . 5
7. Bingjupláss . . . 6
8. Virki: Burturkast frá virkjum . . . 7
9. Spillvatnsevja frá húskjum og virkjum . . . 8
10. Fyrispurningar og fráboðanir . . . 9
11. Undantøk . . . 9
12. Eftirlit . . . 9
13. Kærur . . . 9
14. Revsing . . . 9
15. Gildiskoma . . . 9

## 1. Inngangur

**1.1** Við heimild í *Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, Kunngerð nr. 186 frá 5. november 1993 um spillvatnsevju, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007* og *Viðtøkunum fyri Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin L/F* (IRF), verða hesar reglur um móttøku av burturkasti og tøming av rottangum frá húskjum og virkjum í limakommununum settar í gildi. Fyrilit er eisini havt fyri lógunum og kunngerðunum niðanfyri:

- *Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995*
- *Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91. frá 7. juni 2020*
- *Løgtingslóg nr. 75 frá 13. mai 1992 um umhvørvisgjald á smyrjiolju, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 154 frá 23. desember 2015*
- *Kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, sum seinast broytt við kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009*
- *Kunngerð nr. 90 frá 20. juni 2011 um handfaring og burturbeining av burturkasti*

## 2. Endamál

**2.1** Endamálið við hesum reglum er at tryggja, at alt burturkast og spillvatn, ið IRF tekur ímóti, verður savnað og viðgjørt á tryggan hátt, tekniskt, heilsuliga og umhvørvisliga.

## 3. Reglurnar umfata

**3.1** Hesar reglur eru galdandi fyri øll húski, virki og limakommunur í IRF, og tey hava skyldu til at fylgja ásetingunum í hesum reglum.

**3.2** Reglurnar eru galdandi fyri innsavning og viðgerð av:

- øllum burturkasti og spillvatnsevju, sum stavar frá vanligum húsarhaldi
- øllum burturkasti og spillvatnsevju, sum stavar frá virkjum

**3.3** Reglurnar viðvíkja ikki avgrevstri og botnsigi úr havnum og bátahyljum

**3.4** Um nýggjar skipanir verða royndar, kann IRF seta serstakar fyriskipanir í verk í ávísum kommunum. Viðkomandi kommunur skulu kunnast og hoyrast, áðrenn skipanin verður sett í verk.

## 4. Skipan

**4.1** Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin L/F, stuttstavaður IRF, er eitt lutafelag, har allar kommunur í Føroyum kunnu gerast lutaeigarar. Felagsskapurin hevur til endamáls at virka fyri, at burturkast og annað órudd verður beint burtur. IRF hevur skyldu til at taka ímóti øllum burturkasti.

**4.2** Hægsta vald í felagsskapinum er aðalfundurin. Aðalfundurin velur nevnd við seks kommunustýrislimum fyri eitt valskeið í senn.

**4.3** Nevndin hevur heimild at seta nágreiniligari reglur um, hvussu innsavning, burturkoyring og viðgerð verður skipað.

**4.4** IRF hevur innsavningarskipan til húsarhaldsburturkast í limakommununum sambært *Kunngerð nr. 147 um burturkast* og viðtøkum felagsins.

**4.5** IRF hevur eina góðkenda skipan til innsavning og viðgerð av spillvatnsevju í limakommununum sambært *Kunngerð nr. 186 um spillvatnsevju* og viðtøkum felagsins.

**4.6** IRF hevur innsavningarskipan til spillolju í limakommununum *sambært sáttmála við Føroya Landsstýri*.

**4.7** IRF er eitt tænastuvirki viðvíkjandi burturkasti hjá kommununum. Tað merkir, at limakommunurnar vísa til IRF, tá ið tað ræður um:

- innsavning og viðgerð av burturkasti
- innsavning og viðgerð av spillvatnsevju
- innsavning og viðgerð av spillolju og oljudálkaðum vatni

**4.8** Vísandi til *Kunngerð nr. 147 um burturkast* merkir tað, at borgarar og virki hava skyldu at lata sítt burturkast til IRF eftir teimum reglum, sum eina og hvørja tíð eru galdandi.

**4.9** IRF hevur ikki kommunalan umsitingar- ella eftirlitsmyndugleika í limakommununum mótvegis borgarunum í kommununum. Hesir myndugleikar liggja hjá kommunustýrunum við kærurætti til Umhvørvisstovuna sambært *Kunngerð nr. 147 um burturkast* og *Kunngerð nr. 186 um spillvatnsevju*.

## 5. Allýsingar

**5.1** Húski: Fólk, sum búgva í somu sethúsum, raðhúsum ella íbúð. Bústaðirnir skulu lúka treytirnar í kommunalu byggisamtyktunum.

**5.2** Sethús: Hús, íroknað tvíhús við egnum matr. nr., sum verður brúkt til bústað hjá einum húski.

**5.3** Raðhús: Hús við egnum matr. nr., ið er samanbygt við fleiri hús í eini røð, og sum verður brúkt til bústað hjá einum húski.

**5.4** Íbúð: Sjálvstøðugur bústaður í sethúsum, raðhúsum v.m., sum verður brúktur til bústað hjá einum húski.

**5.5** Frítíðarhús: Hús, íroknað tvíhús, sum verður brúkt til bústað ein part av árinum.

**5.6** Eigari: Tann, sum sambært tinglýsingini eigur føstu ognina.

**5.7** Virki: Skrásett felag/persónur við vinnuligum endamáli, sama um hetta er mvg-skrásett ella ikki. Almennur, kommunalur og privatur stovnur, havnir, samkomuhús, felagshús ella annað virksemi, sum ber í sær øðrvísi ella meira burturkast ella spillvatnsevju enn tað, sum kann roknast at hoyra einum húsarhaldi til.

**5.8** Burturkast: Lutur, ið verður latin til endurvinning, brenning ella tyrving.

**5.9** Vinnuligt burturkast: Burturkast frá virkjum í limakommunum hjá IRF.

**5.10** Serliga dálkandi burturkast: Sambært yvirliti í fylgiskjali til *Kunngerð nr. 147 um burturkast*.

**5.11** Burturkastflokkar: IRF ger av, hvussu burturkast verður flokkað.

**5.12** Spillvatnsevja: Skarn og vesipappír, sum verður afturhildið í rottanga.

**5.13** Innsavningarskipan:
- Skipan, har burturkast verður heintað frá húski ella virki
- Skipan, har spillvatnsevja verður heintað frá sethúsum, raðhúsum, íbúð, frítíðarhúsum ella virki

**5.14** Ruskstað: Staðið á ogn, har ruskposastativ stendur.

**5.15** Koyrivegur: Vegur, har ruskbilur kann koyra til matrikkulin.

**5.16** Flutningsvegur: Gonguteinur millum ruskstað og koyriveg til ognina.

**5.17** Grái posin: Posi við IRF-áskrift til húsarhaldsburturkast, sum skal brennast.

**5.18** Grái keypsposin: Posi, ið fæst til keyps við IRF áskrift til húsarhaldsburturkast, sum skal brennast. Grái keypsposin er ætlaður teimum, ið eru í uppisetri fyri gráa posan, og til frítíðarhús.

**5.19** Hvíti posin: Posi við IRF-áskrift til pappír og papp, sum skal endurvinnast.

**5.20** Reyði posin: Posi við IRF-áskrift til serliga dálkandi burturkast at brenna ella endurvinna.

**5.21** Innsavnari: Starvsfólk hjá IRF, sum heintar posar.

**5.22** Evjuinnsavnari: Starvsfólk hjá IRF, sum tømir rottangar.

**5.23** Avhendingarskipan: Skipan, har kommunan vísir á móttøku, sum húski kunnu lata burturkast til eftir ávísum treytum. Kommunan hevur ábyrgd av, at móttøkan verður rikin sambært hesum reglum.

**5.24** Bingjupláss: Kommunalt pláss, sum tekur ímóti burturkasti.

**5.25** Móttøkustað: Móttøkustøðir hjá IRF.

**5.26** Evjumóttøka: Pláss, har evja verður kálkviðgjørd og løgd á goymslu.

**5.27** Tømingarætlan: Ætlan fyri tøming av rottangum og reinsiverkum í einum øki.

**5.28** Rottangaflokkur: Húski og virki.

**5.29** Goymsla: Posar frá IRF, smábingja á hjólum, lokað bingja, last, tangi ella íløt, sum IRF hevur góðkent.

**5.30** Avrokningareindir:
- Vekt
- Rúmd
- Stykki

**5.31** Tættleiki fyri burturkast: Burturkastið liggur í hóskandi goymslu og er ikki stúvað meira enn tað, sum kann gerast við berum hondum.

## 6. Húsarhald: Innsavningarskipan til húsarhaldsburturkast

**6.1** Skipanin fevnir um innsavning av gráa, hvíta og reyða posa við bústaðin.

### Grái posi

**6.2** IRF heintar ein gráan ruskposa um vikuna frá hvørjum húski. Grái posin verður í mest møguligan mun tikin sama dag hvørja viku.

**6.3** IRF heintar tveir gráar ruskposar um vikuna frá húskjum, har tað eru 6 fólk ella fleiri og húskjum við serligum heilsuligum tørvi. Bý/bygdaráðini upplýsa IRF um hesi húski.

**6.4** Innsavnararnir taka eisini gráar keypsposar við IRF-áskrift frá húskjum og frítíðarhúsum. IRF heintar í mesta lagi ein gráan keypsposa um vikuna frá hvørjum húski, tó kunnu stór húski hava tveir gráar keypsposar.

**6.5** Burturkast má ikki koyrast leyst í gráa ruskposan, men skal latast í ein afturlatnan posa.

**6.6** Orsøkir til, at grái ruskposin ikki verður tikin, kunnu vera:

- Grái ruskposin er skræddur.
- Grái ruskposin vigar meir enn 20 kg.
- Grái ruskposin er ovurfyltur, t.v.s. at tað eru minni enn 20 cm upp til kantin á posanum.

**6.7** Verður grái posin ikki tikin, fær viðkomandi húski boð um orsøkina frá IRF. Um borgarin ikki fær boð, kann orsøkin vera kavi, hálka ella tílíkt.

**6.8** Frítíðarhús eru ikki íroknað limagjaldið hjá IRF. Tískil er neyðugt at keypa gráar keypsposar til frítíðarhús. Kommunur boða IRF frá, hvørji hús eru frítíðarhús.

**6.9** IRF útflýggjar hvørjum húski gráar ruskposar, svarandi til ein posa um vikuna. Innsavnararnir taka bert gráar posar við IRF-áskrift. Posin skal bert nýtast til húsarhaldsburturkast.

**6.10** Húski skulu hava stativ til gráa ruskposan. Hevur húskið fingið loyvi til at hava tveir posar, er eisini neyðugt at hava tvey stativ.

### Hvíti posin

**6.11** IRF tekur ein hvítan posa frá hvørjum húski við føstum millumbilum.

**6.12** IRF kann, um serligar grundir eru fyri tí, gera av, at papp og pappír ikki verður heintað í einari kommunu. Viðkomandi kommuna skal kunnast og hoyrast, áðrenn skipanin verður sett í verk. IRF kunnar íbúgvarnar um skipanina.

**6.13** IRF útflýggjar hvørjum húski hvítar posar í samsvari við innsavningartíttleikan.

**6.14** Hvíti posin skal stillast við ruskstativið, tá ið hann er fullur. Tað er ikki neyðugt at hava stativ til hvíta posan.

### Reyði posin

**6.15** IRF tekur reyða posan, tá ið eigarin setur posan við ruskstativið hjá gráa ruskposanum. Posakjafturin skal vera afturlatin á tryggan hátt.

**6.16** Hvørt húski fær ein nýggjan reyðan posa, so hvørt húskið letur ein reyðan posa til IRF. Innsavnarin festir nýggja posan í ruskstativið á tryggan hátt.

**6.17** Ljósperur, kanylir og patrónir, ið kunnu skaða innsavnaran, skulu latast í trygg íløt, áðrenn tey verða latin í reyða posan.

### Umstøður

**6.18** Ruskstaðið skal vera soleiðis, at tað er møguligt at koma heilt fram at stativinum við t.d. sekkjavogni, at stativið stendur á sløttum, soleiðis at posin kann takast uttan trupulleikar, og at posin kann takast og flytast uttan vanda fyri vanlukku ella heilsuskaða.

**6.19** Posastativið skal standa úti á sjónligum stað og sum høvuðsregla á stytstu leið millum koyriveg og húsini, tó í mesta lagi 20 metrar frá koyrivegi. Hjá húsarhaldum, ið hava meir enn ein posa, skal stativið í mesta lagi standa 10 metrar frá koyrivegnum. Bert eitt ruskstað skal vera á hvørjari ogn.

**6.20** Húski útvega og viðlíkahalda sjálv stativini. Stativið skal vera heilt.

**6.21** Gonguleiðin skal vera sløtt og føst, ljós, rein og ruddilig. Gonguleiðin má ikki vera hál og skal vera ruddað fyri kava og ís.

**6.22** Portur, lúkur el.til. skulu kunna standa í opnari støðu og vera nóg breið og høg til, at flutningurin kann fara fram uttan vanda.

**6.23** Innsavnarin fer frá ognini, sum hann kom til hana. T.v.s. at portur o.t. skal latast aftur, tá ið farið verður av ognini.

**6.24** Hundar ella onnur djór skulu á ongan hátt vera til ampa fyri innsavnaran.

**6.25** Dettur burturkast niður, tá ið posin verður tikin, tekur innsavnarin hetta upp og beinir tað burtur, treytað av at krøvini í reglugerðini eru fylgd.

**6.26** Húski í limakommununum hava skyldu at skilja burturkast samsvarandi teimum skipanum, sum eru ella verða settar í verk av IRF, sambært *Kunngerð nr. 147 um burturkast* og viðtøkum felagsins.

**6.27** Húski í limakommununum hava skyldu til at nýta tær innsavningarskipanir, sum eru ella verða settar í verk av IRF.

**6.28** Húski í limakommunum hava skyldu til at nýta tær avhendingarskipanir, sum eru ella verða settar í verk av kommununum sambært *Kunngerð nr. 147 um burturkast*.

**6.29** Um meira enn eitt húski er í einum sethúsum, hava tey skyldu til at hava felags ruskstað. IRF avger, um hús við fleiri íbúðum, raðhús og íbúðir í ávísum økjum skulu hava felags ruskstað ella bingju til húsarhaldsburturkast. Viðkomandi íbúgvar og kommuna skulu kunnast og hoyrast, áðrenn støða verður tikin til at seta skipanina í verk.

**6.30** IRF kann taka avgerð um, at á ávísum ognum ella í ávísum bústaðarøkjum skulu bingjur nýtast í staðin fyri ruskposar. Viðkomandi íbúgvar og kommuna skulu kunnast og hoyrast, áðrenn skipanin verður sett í verk.

## 7. Bingjupláss

**7.1** Kommunan hevur skyldu til at hava bingjupláss til burturkast frá borgarunum sambært *Kunngerð nr. 147 um burturkast*. Kommunur kunnu samstarva um bingjupláss.

**7.2** Kommunan byggir og rekur bingjuplássið í samráð við IRF, og kommunan hevur ábyrgdina av, at støðin verður rikin forsvarliga.

**7.3** Bingjuplássið er bert opið ávísar tíðir. Plássið er mannað, tá ið opið er. Kommunan ásetur sjálv, nær og hvussu leingi bingjuplássið er opið.

**7.4** Kommunan setur og lønir starvsfólki at vegleiða og hava eftirlit á bingjuplássinum. Kommunan hevur eisini ábyrgd av at útbúgva starvsfólkið í samráð við IRF.

**7.5** Kommunan hevur skyldu til at halda bingjuplássið og økið rundanum reint og ruddiligt og fylgja teimum ásetingum, sum IRF setur.

**7.6** IRF letur bingjur til bingjuplássið við fyriliti fyri íbúgvaratalinum í kommununi og ber kostnaðin av øllum vanligum viðlíkahaldi av teimum, sum stendst av vanligum sliti og elli. Kommunan hevur ábyrgd av skaða ella óhappi, sum ikki stendst av vanligum sliti og elli.

**7.7** IRF tømir bingjurnar eftir tørvi. Tó skulu bingjur til burturkast, ið skal brennast, sum meginregla tømast eina ferð um vikuna.

**7.8** Burturkast frá bingjuplássum verður avroknað sambært prísskipan felagsins, tó ikki útoyggjar. Útoyggjar eru: Fugloy, Svínoy, Mykines og Skúvoy.

**7.9** Prísur fyri burturkast er galdandi fyri skilt burturkast í goymslum, nevndar í stk. 5.29 við tættleika nevndur í stk. 5.31.

**7.10** Verður burturkast viðgjørt, áðrenn tað verður latið í goymslu, ella goymt í øðrum goymslum enn teimum, nevndar eru í stk. 5.29, er neyðugt at gera avtalu við IRF um avrokningarprís.

**7.11** Hesi minstukrøv verða sett til bingjupláss viðvíkjandi støðd, styrki, trygd og reinføri.

- Fast og tætt undirlag – skal tola 10 tons aksiltrýst.
- Betonggarð – uml. 0,5 m høgur.
- Hegn – uml. 2 m høgt.
- Portur – meira enn 6 m breitt.
- Festir til bingjur, sum standa á plássinum.
- Ljós – so tað sæst at ganga og at lesa møguligar vegleiðingar á bingjum o.ø.
- Vatn – nóg mikið til at spula pláss og bilar.
- Frárensl – helst við brunni til feitt og grugg.
- Atkomu – liggur bingjuplássið við ein høvuðsveg, er neyðugt at hava umleið 9 metrar millum bingjur og portur. Kunnu ruskbilarnir brúka atkomuøkið at arbeiða á, kann plássið vera grynri. Bilarnir eru upp til 10 metrar langir.

**7.12** Allar størri broytingar ella nýgerðir skulu leggjast fyri IRF til viðmerkingar, áðrenn broytingarnar verða framdar.

**7.13** Burturkast frá nýbygging og størri umvælingum av sethúsum, úthúsum og tílíkum verður roknað sum vinnuligt burturkast.

**7.14** Bingjupláss skulu verða soleiðis skipað, at tað ber til at sleppa av við allar burturkastflokkar hjá IRF. Í serligum førum kunnu undantøk gerast.

**7.15** Tá ið burturkast verður latið á bingjuplássið, skal tað vera skilt sambært burturkastbólkum hjá IRF.

## 8. Virki: Burturkast frá virkjum

**8.1** Virki í limakommununum hava skyldu at skilja burturkast samsvarandi teimum skipanum, sum eru ella verða settar í verk av IRF.

**8.2** Á hvørjum virki skal vera ein persónur, sum hevur ábyrgd av skiljing, goymslu og avskiping av burturkasti.

**8.3** Kravt verður ikki, at trúnaðarskjøl skulu skiljast til endurvinning. Tikið verður tó ímóti makuleraðum trúnaðarskjølum.

**8.4** IRF kann í serligum førum, har burturkast í nøgd og/ella skapi ikki kann viðgerast á vanligu móttøkustøðunum, áleggja virki at betra um møguleikarnar fyri, at IRF kann viðgera burturkastið, ella at skipa fyri serligari viðgerð av burturkastinum.

**8.5** Virki hevur skyldu til at geva IRF allar upplýsingar um burturkast. Virki hevur eisini skyldu til at bera kostnaðin av møguligari kanning og/ella greining av burturkasti til tess at kunna hava eina umhvørvisliga rætta viðgerð av tí.

**8.6** Nýtt virki skal boða IRF frá við upplýsingum um, hvat slag av burturkasti og hvørjar nøgdir virkið fer at hava.

**8.7** Virki hava skyldu til at boða IRF frá, um tað henda munandi broytingar í burturkastnøgdum ella -samanseting.

**8.8** Virki skal tryggja, at umstøður eru til at hava goymslu til allar burturkastflokkar, sum koma frá virkinum ella virkseminum.

**8.9** Virki skal tryggja, at óviðkomandi persónar ikki hava atgongd til goymslurnar. IRF hevur heimild til at gera serligar reglur fyri ávísar virkisbólkar.

**8.10** Virki hevur skyldu til at hava goymslu til nøgdina í minst eina viku til hvønn burturkastflokk sær. IRF kann áleggja virki at fáa sær størri goymslu, um verandi goymsla javnan er ov lítil.

**8.11** Gráir virkisposar skulu standa úti í stativi á einum sjónligum stað.

**8.12** Goymsla av burturkasti má ikki føra til órudd, dálking ella annan ampa á virkisognini ella á grannaognini ella draga rottu og onnur djór til sín sambært *Kunngerð nr. 53 um umhvørvisreglur*.

**8.13** Burturkast, sum kann fúka, skal vera í afturlatnum goymslum. Leyst papp og pappír skal goymast í regntøttum goymslum. Ball kunnu goymast uttandura í styttri tíð.

### IRF sum flutningsfelag

**8.14** Virki skulu boða IRF frá í góðari tíð, at tað vil hava burturkast heintað. Er meira burturkast fráboðað, enn móttøkuorka er til, verða virki sett á avgreiðslulista.

**8.15** Ábyrgdina av, at burturkastið verður heintað, flutt og viðgjørt á rættan hátt, hevur IRF.

**8.16** Bilførarin hevur bert skyldu til at taka burturkastið, sum er skilt samsvarandi forskriftum frá IRF og er í hóskandi goymslu.

**8.17** Bilførarin skal kunna koyra flutningsbilin heilt fram at goymsluni. Goymslurnar mugu hóska til innsavningarskipanina hjá IRF.

**8.18** Bilførarin skal skoða burturkastið, áðrenn hann tekur tað upp á flutningsbilin. Kann bilførarin ikki út frá skoðanini avgera, hvør burturskastflokkur er í goymsluni, kann hann krevja skrivliga váttan frá virkinum um, hvønn burturkastflokk talan er um.

**8.19** Bilførarin skal tryggja, at burturkast ikki dettur úr bilinum undir flutningi. Innsavningarbilar við trýstbingju skulu ikki flyta burturkast í móttøkukarinum.

### Onnur flutningsfeløg

**8.20** Flutningsfelag skal í góðari tíð gera avtalu við IRF um móttøku av burturkasti. Er meira burturkast fráboðað, enn móttøkuorka er til, verður felagið sett á avgreiðslulista.

**8.21** Ábyrgdina av, at burturkastið verður heintað og flutt á rættan hátt, hevur flutningsfelagið.

**8.22** Flutningsfelagið skal tryggja sær, at burturkastið er skilt samsvarandi forskriftum frá IRF.

**8.23** Flutningsfelagið skal upplýsa IRF, hvaðani burturkastið kemur, burturkastflokk og nøgd. IRF kann taka stakroyndir.

**8.24** Flutningsfelagið skal tryggja, at burturkast ikki dettur úr bili undir flutningi.

**8.25** Virki ella onnur, sum koyra burturkast við egnum flutningsfari, skulu fylgja somu treytum sum flutningsfeløg umrødd frá 8.15 til 8.19.

### Prísir

**8.26** Burturkast frá virkjum verður avroknað sambært prísskipan felagsins.

**8.27** Prísir fyri burturkast eru galdandi fyri skilt burturkast í goymslum, nevndar í stk. 5.29 við tættleika nevndur í stk. 5.31.

**8.28** Verður burturkast viðgjørt, áðrenn tað verður latið í goymslu, ella goymt í øðrum goymslum enn teimum, nevndar eru í stk. 5.29, er neyðugt at gera avtalu við IRF um avrokningarprís.

## 9. Spillvatnsevja frá húskjum og virkjum

**9.1** Eigarin hevur sambært *Kunngerð nr. 53 um umhvørvisreglur* skyldu til at tryggja, at spillvatn verður leitt í rørum til rottanga ella reinsiverk.

**9.2** Eigarin hevur sambært *Kunngerð nr. 186 um spillvatnsevju* skyldu til at nýta ta skipan til rottangatøming, sum kommunan ávísir.

**9.3** Eigarin av rottanganum hevur ábyrgd av, at tangin er í forsvarligum standi og ikki er til ampa fyri umhvørvið.

**9.4** Eigarin hevur eina og hvørja tíð alla ábyrgd av, at fólk og fæ trygt kunnu ferðast tvørtur um rottangan.

**9.5** Eigarin hevur skyldu at tryggja, at rottangin bert verður brúktur til tað, hann er ætlaður til.

**9.6** Eigarin hevur skyldu at boða IRF frá broytingum í eigaraviðurskiftum, ábyrgdarviðurskiftum og tekniskum broytingum.

**9.7** Eigari av virki hevur sambært *Kunngerð nr. 53 um umhvørvisreglur* skyldu til at tryggja, at spillvatn verður leitt í rørum til rottanga ella reinsiverk.

**9.8** Eigarin útvegar og viðlíkaheldur sjálvur rottangan. Nýggjur rottangi skal vera góðkendur av Heilsufrøðiligu Starvstovuni sambært *Kunngerð nr. 53 um umhvørvisreglur*.

**9.9** IRF hevur ábyrgdina av, at innsavningarskipanin virkar sambært *Kunngerð nr. 186 um spillvatnsevju.*

**9.10** IRF skipar fyri innsavning av spillvatnsevju frá húsarhaldum og virkjum. Skipanin fevnir um tøming av rottanga ella reinsiverki frá sethúsum, raðhúsum, tvíhúsum, íbúðum, frítíðarhúsum og virkjum.

**9.11** Hvørt sethús, raðhús, íbúð, frítíðarhús og virki skal vera bundið í rottanga ella reinsiverk.

**9.12** IRF tømir skrásettar rottangar treytað av:
- at tangin er lættur at koma til
- at tað er grivið væl frá rundan um lokið
- at lokið er væl fest, men lætt at loysa
- at lokið er trygt og heilt
- at lokið er lætt at festa aftur, tá ið arbeiðið er liðugt
- at innihaldið í tanganum er í samsvari við tað, tangin er ætlaður til

**9.13** Metir IRF, at okkurt av omanfyri nevndu punktum ikki er í lagi, kann hetta hava við sær, at tangin verður ikki tømdur. Eigarin fær fráboðan um, hvørji viðurskifti ikki eru í lagi. Kommunan fær avrit av fráboðanini, um lokið er óforsvarligt.

**9.14** Tangi við tekniskum frávikum nevnd í 9.12 verður ikki tømdur, fyrr enn váttan er komin um, at tey eru rættað. Kemur váttanin innan 14 dagar eftir, at fráboðanin er send, verður tangin tømdur uttan kostnað. Virki gjalda altíð fyri tøming.

**9.15** Kommunan rindar fyri at tøma rottangar frá húsarhaldum, sum verða tømdir sambært tømingarætlanini. Eigari av frítíðartíðarhúsum má gjalda fyri tøming av rottanga.

**9.16** Rottangar frá sethúsum, raðhúsum, tvíhúsum, íbúðum og frítíðarhúsum við vinnuligum virksemi verða roknaðir sum ein fyritøka. Kommunan rindar ikki limagjald fyri hesi húski, og eigarin má gjalda fyri at fáa rottangan tømdan.

**9.17** Eigari fær rokning sambært galdandi prísskipan, um rottangi verður tømdur uttan fyri tøming-arætlanina.

**9.18** Tangar við nógvum óviðkomandi tilfari kunnu bert tømast móti gjaldi sambært galdandi prís-skipan.

## 10. Fyrispurningar og fráboðanir

**10.1** Fyrispurningar viðvíkjandi burturkasti ella spill-vatnsevju skulu stílast til IRF.

**10.2** Fráboðanir um broytingar skulu latast komm-ununum í góðari tíð.

**10.3** Fráboðanir um broytingar skulu latast virkjunum í góðari tíð.

## 11. Undantøk

**11.1** IRF kann í serligum førum gera undantak frá hesum reglum.

**11.2** Nevndin í IRF hevur heimild til at gera broytingar í reglunum, sum skulu kunngerast kommunum og borgarum í góðari tíð.

## 12. Eftirlit

**12.1** Tann einstaka limakommunan í IRF hevur eftirlit við, at ásetingar í hesum reglum verða fylgdar.

**12.2** Verða viðurskifti, sum ikki eru í samsvari við reglurnar, staðfest, skal eigarin gera avtalu við kommununa um at fáa hesi viðurskifti í rættlag innan ávísa freist.

**12.3** Kommunan boðar IRF frá, at viðurskiftini eru komin í rættlag.

## 13. Kærur

**13.1** Kærur um burturkast og spillvatnsevju skulu stíl-ast beinleiðis til IRF.

**13.2** Húski kunnu kæra avgerðir hjá IRF eftir hesum reglum til avvarðandi kommunu.

**13.3** Virki kunnu kæra avgerðir hjá IRF eftir hesum reglum til avvarðandi kommunu.

**13.4** Kommunur kunnu kæra avgerðir hjá IRF eftir hesum reglum til Umhvørvisstovuna.

**13.5** Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er frá-boðað viðkomandi. Kæran skal sendast til IRF, sum saman við møguligum skjølum sendir kær-una til Umhvørvisstovuna.

**13.6** IRF er sum kommunalt samstarv sambært kommunustýrislógina § 48 undir eftirliti av lands-stýrismanninum, sum umsitur kommunumál.

## 14. Revsing

**14.1** Verða ásetingar í hesum reglum ikki hildnar, kann IRF nokta fyri at taka ímóti burturkasti frá húskjum, bingjuplássum og virkjum. IRF boðar viðkomandi kommunu frá hesi avgerð. Møgulig brot á lógir og kunngerðir nevndar í §1.1 kunnu verða revsað sambært ásetingunum.

**14.2** Verða ásetingar í hesum reglum ikki hildnar, kann IRF nokta fyri at tøma rottanga hjá húski ella virki og boða viðkomandi kommunu ella Umhvørvis-stovuni frá hesi avgerð. Møgulig brot á lógir og kunngerðir nevndar í §1.1 kunnu verða revsað sambært ásetingunum.

## 15. Gildiskoma

**15.1** Reglurnar koma í gildi 30 dagar eftir, at tær eru samtyktar á aðalfundi felagsins.

**15.2** Broytingar í hesum reglum skulu samtykkjast á aðalfundi felagsins.

**15.3** Reglurnar verða lýstar í stóru dagbløðunum og á heimasíðuni *www.irf.fo* í seinasta lagi eina viku eftir, at tær eru samtyktar á aðalfundi felagsins.

**15.4** Hesar reglur eru samtyktar á aðalfundi felagsins tann 21. apríl 2021.